# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Eitt hugnaligt prát

**BYGDAMENTAN**
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Sandoyingar eru tiltiknir fyri at duga væl at siga tingini. Og ein skal ikki hava verið leingi saman við einum sandoyingi, fyrrenn láturin rungar.

Ein dag í farnu viku, tá Sosialurin vitjaði heima á Sandi, komu vit fram á hesar menninar sum stóðu og prátaðu saman úti í Støð.

Helst er okkurt orðið fallið um kommunalpolitikk, tí borgarstjórin á Sandi, Brandur Sandoy (uttast høgrumegin) var ein teirra.

Hinir báðir eru eisini kendir á oynni - Bogi Petersen, ið hevur við ruskstaðið at gera og Sámal Hentze, sum koyrir oljubil.

Av sonnum, ein hugnalig bygdarmynd í tí góða veðrinum.



*Tríggir mans í løttum práti - vinstrumegin: Bogi Petersen, Sámal Hentze og Brandur Sandoy*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




## Føðingar



*4. februar fingu Christina Lamhauge og Sofus Jacobsen eina dóttur á Aalborg sjúkrahúsið. Hon var 55 cm long og vigaði 4140 gr.*

9. februar fingu Sólbjørg Sigurstein og Albin Wang Ísaksson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3500 gr.

12. februar fingu Laila Hentze, Trongisvágur og Poul Dan Kjærbo, Vágur, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3710 gr.

12. februar fingu Turið Weihe Madsen og Bogi Arnold Øster, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3750 gr.

13. februar fingu Jonleyg og Ivan Fossabrúgv, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4660 gr.

14. februar fingu Alexandra Müller Porkeri og Sam Ripley, Vágur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4000 gr.

15. februar fingu Tórhild Hentze og Ólavur Poulsen, Søldarfjørður, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4830 gr.

15. februar fingu Guðrun og Mortan Vang, Argir, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4030 gr.

15. februar fingu Heidi og Arnbjørn Egholm, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3650 gr.

16. februar fingu Vár Hansen og Áki Smith Jensen, Trongisvágur, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4100 gr.

### Prógv



Tann 3. des. 2009 fekk Katrin Petersen úr Klaksvík prógv í "Master of Science in Financial Management" (fíggjarstýring) á The Robert Gordon University, Aberdeen.